## Byggivinnan svikaði



Ein rannsóknardeild hjá donsku løgregluni hevur avdúkað ólógligt samstarv millim grønlendskar byggifyritøkur. Grønlendska kringvarpið sigur, at løgreglan staðfesti fyrst tveir tilburðir, har byggifyritøkur hava avtalað, hvat tær skuldu bjóða upp á tvey ávís byggiarbeiði, og síðani eru fleiri tilburðir komnir afturat. Sambært kringvarpinum var tað ein loynilig bandupptøka, sum avdúkaði tað fyrsta svikið. Á upptøkuni avtalaðu tvey byggifeløg, hvussu tey skuldu býta arbeiðið sínamillum, og tílíkt samstarv er ólógligt í sambandi við útbjóðingar.

## Danir keypa meiri

Nýggj nýtslutøl hjá donsku hagstovuni vísa, at danir eru farnir at brúka meiri pengar teir seinastu mánaðirnar. Teir brúka serliga nógvar pengar til klæðir og sjónvørp, men teir keypa eisini meiri av vanligum nýtsluvørum enn fyrr í ár. Eitt nú vaks klædnasølan næstan tvey prosent í oktober. Í Danske Bank vænta tey, at keypihugurin hjá dønum fer at standa við, tí lønarlagið hækkar, inflasjónin er lág og somuleiðis rentan. Harafturat kemur, at danir fáa skattalætta næsta ár, og so bendir alt á, at húsavirðið er á veg uppeftir eftir støðugt fall tað seinasta árið.

# Tingmaður spyr um talufrælsi hjá flogskiparum

**John Johannessen, løgtingsmaður, vil hava Johan Dahl, landsstýrismann, at siga, um hald er í pástandinum um, at flogskiparar hjá Atlantsflog hava fingið munnkurv frá leiðsluni.**



*Tilvildarlig mynd*

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Er landsstýrismaðurin vitandi um, at leiðslan í Atlantsflogi hevur noktað starvsfólkum sínum - harímillum flogskiparum - at hava eina almenna meining um ætlaðu flogvallarútbyggingina í Vágum?

Hetta er ein av trimum spurningum, sum John Johannessen vil hava vinnumálaráðharran at greiða løgtinginum frá. John Johannessen vil eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin, sum høvuðspartaeigari í felagnum stuðlar avgerðini um, at flogskiparar, sum dagliga operera upp á flogvøllin í Vágum, hvørki alment ella á stongdum fundum sleppa at siga sínar hugsanir um møguligar fyrimunir og vansar við ætlaðu útbyggingini.

– Heldur landsstýrismaðurin hetta taluforboð vera fremjandi fyri álitið á ætlaðu verkætlanina, og hevur landsstýrismaðurin eina generella meining um, hvussu langt talufrælsið hjá starvsfólkum í almennum partafeløgum eigur at røkka? spyr John Johannessen.

Í viðmerkingum til fyrispurningin sigur John Johannesen, at tað er vorðið alment kent í politisku skipanini, at tað í sambandi við ætlaðu verkætlanina um útbygging av flogvøllinum í Vágum ikki ber til at fáa fram sjónarmiðini hjá teimum flogskiparum, sum dagliga flúgva til og frá verandi vølli og í framtíðini skulu vera høvuðsbrúkarar av útbygda vøllinum.

– Forkvinnan í Vinnunevndini hevur kannað møguleikan fyri at fáa sjónarmiðini hjá flogskiparunum lýst, tá málið kemur í Vinnunevndina til nærri viðgerðar. Forkvinnan heldur tað vera umráðandi at fáa fram hesi sjónarmiðini, hóast tað nú frættist, at flogskipararnir hava fingið skrivligt múlaband frá leiðsluni í Atlantsflogi, sigur John Johannessen.

Løgtingsmaðurin heldur, at hetta vekir ikki sørt av undran, tá talan er um eina verkætlan fyri hundraðtals milliónir, ið tingfólk ikki hava neyðuga fakliga førleikan at meta um, og tað tí er avgerandi, at vit fáa røttu og neyðugu kunningina hjá ymsum fakfólkum, harímillum flogskiparum fyri betur at kunna grunda okkara støðutakan.

– Uppaftur meira undrar hetta, um man lesur tær viðmerkingar og útgreiningar, ið eru gjørdar til grein 77 í grundlógini, sum er tann, ið ásetir talufrælsið. Har verður nógv gjørt burtur úr rættinum hjá starvsfólkum at úttala seg, sigur John Johannessen.

John Johannesen vísir eisini á eina útgreining hjá DJØF, har tað eitt nú verður sagt soleiðis:

»Hvis du udtaler dig som privatperson og under respekt for reglerne om tavshedspligt, har du frihed til at fremsætte endog meget kritiske synspunkter om din arbejdsplads og dit arbejdsområde.

Fremsætter du bevidst urigtige oplysninger eller en helt ubegrundet kritik, kan det være en tjenesteforseelse.

Din arbejdsgiver kan ikke indføre retningslinier, der forbyder dig at ytre dig (som privatperson) uden arbejdsgiverens tilladelse, eller kræve, at ledelsen skal godkende dokumenter eller lignende, før de offentliggøres.

Arbejdsgiveren kan altså ikke udøve nogen forudgående kontrol af private ytringer.«

John Johannessen heldur, at tað hevði verið áhugavert at fingið at vita, um landsstýrismaðurin er samdur í hesum prinsipiellu viðurskiftum, og um hann heldur tey eisini skulu galda fyri flogfelagið, sum almennu Føroyar eru høvuðspartaeigari í.

# Eystanljóð í Christianskirkjuni og í Gøtu Kirkju

**Kórið Eystanljóð skipar trúliga fyri jólakonsert hvørt ár, og soleiðis verður eisini í ár. Hesaferð verða tvær konsertir - báðar verða sunnudagin 6. desember – í Christianskirkjuni kl. 16 og í Gøtu Kirkju kl. 19.30**

KONSERT

Á konsertini luttaka eisini norski organisturin Kristoffer Myre Eng, Eivør Pálsdóttir og gentukór úr Klaksvík

Skráin í ár er serlig á tann hátt, at kórið fer at syngja partar úr Requiem av Gabriel Fauré. Verkið verður framført við orgulfylgispæli, har kendi norski organisturin Kristoffer Myre Eng kemur at spæla undir, og Eivør Pálsdóttir syngur solo í Pie Jesu. Kórleiðari hjá Eystanljóð er Petur Martin Johannesen úr Klaksvík. Hetta er triðja árið at Petur Martin venur kórið, ið hevur verið í støðugari menning undir hansara kønu hond.

Á konsertini fer Kristoffer Myre Eng, ið er kendur fyri sínar orgulimprovisatiónir, eisini at improvisera yvir føroyska sálmalagið “Jeg vil mig Herren love”. Eivør og Eystaljóð geva eisini sítt íkast til hendan partin av konsertini. Eivør hevur á konsertum her heima og víða um í heiminum framført og gjørt improvisatiónir yvir hetta og onnur kingoløg, so tað verður forvitnisligt at hoyra, hvat tað kann blíva til við norskum orguliblástri.

Seinna partin av konsertini syngur kórið nakrar traditionellar jólasangir, gentur í 6. og 7. flokki í ovara og niðara skúla í Klaksvík fara at framføra tvey jólaløg og Eivør fer at framføra nøkur løg.

Konsertin er ókeypis, men tey, ið ynskja at stuðla tiltakinum, kunnu lata eina gávu úti í forkirkjuni.



*Báðar konsertirnar hjá Eystanljóð verða sunnudagin 6. desember – í Christianskirkjuni kl. 16 og í Gøtu Kirkju kl. 19.30*

*Mynd: Dávur Winther*